

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 07 - 2012

# Atlantic Petroleum avskrivað 14 mill. kr.

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum noyðist at avskriva 14 mill. kr. í hesum fíggjarárinum, nú felagið saman við hinum loyvishavarunum í loyvi P.1047, sum fevnir um teigin 20/3c á bretska landgrunninum, hevur verið noytt at lata innaftur loyvi, nú loyvistíðin er útgingin. Loyvið fevnir um Marten fundið, har Nexen var fyristøðufelag. Atlantic Petroleum átti 17,5% lut í loyvinum. Ben Arabo , stjóri sigur, at hetta fer ikki at hava ávirkan á gjaldførið og framleiðslumetingina fyri 2012. Við 34 loyvum hevur Atlantic Petroleum ætlan um at fara undir nýggjar boringar í ár og næsta ár. Í løtuni er felagið við til at bora Brugdan 2 brunnin á føroyska landgrunninum, og seinni í ár verður sett á Spaniard brunnin á bretskum øki.

